FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

# Frásøgn/niðurstøður frá seminarinum um kommunala fíggjarstýring 21. Juni 2012

**Millumrokningar:**
*Generelt:* tað manglar nógv fyri at fáa millumrokningar at stemma, serliga millum kommunur og millum kommunur og landið.

*7120/7620:*
Kommunur skulu balansera innanhýsis flytingar í kommununi, t.e. STRKT 7120 og STRKT 7620 skulu stemma. Hetta hevur kommunan sjálv ábyrgd av.
Fíggjarmálaráðið (Terji) broytir testprogrammið til at eftirkanna, at 7120/7620 stemma mánað fyri mánað.

*7130/7630:*
Kommunurnar skulu avstemma 7130/7630 aktivt við sínar samstarvskommunur.
Til dømis, kommunurnar skulu gera skjal, ið vísur á hvørja kontu tey bóka flytingar og frá til aðrar kommunur. Skjalið verður sent til tær kommunur, ið flutt verður til/frá. Til dømis, samskiftir Fuglafjarðar kommuna við Eystur kommunu, men eisini Eysturkommuna til Fuglafjarðar.
Tað eru eisini kommunalar eindir uttanfyri nýggja roknskaparverkið. Til dømis minstu kommunurnar, felagskommunalir stovnar v.m. Avgjørt var at flytingar til/frá hesar ikki skal um 7130/7630, men á 5410 tá útreiðsla, og 6390 tá talan er um intøku. 7130/7630 verða sostatt einans fyri kommunur, sum eru við í nýggju skipanini.

*7210/77xx hjá landium og 7310/7810 hjá kommununum:*
Tað stemmar ikki í flytingum millum land og kommunur heldur.
Størsti syndarin her er flytingin frá landinum til Tórshavnar kommunu fyri at kommunan rekur ellisheim hjá landinum. Gjaldstovan (Leif) tekur initiativ til, at Nærverkið framyvir bókar sítt á STRKT 7210 og flytur umvegis kommunuavrokningina, og avstemmar flytingina við 7810 hjá Tórshavnar kommunu. Tórshavnar kommuna hevur higartil játtað netto til ellisheimini hjá landinum. Tórshavnar kommuna (Eydna) tekur stig til, at játtað verður brutto framyvir.
Tað eru eisini flytingar uttanfyri kommunuavrokningina frá/til land og kommununum. Til dømis flytingar til/frá kreditorbókhaldinum hjá Nærverkinum. Avgjørt var, at flytingar til/frá hesar ikki skal um 7310/7810, men á aðrar kontur, nevniliga á 5410/6390. Gjaldstovan (Leif) hevur tekur stig til at landið broytir mannagongd, einstøku kommunurnar taka stig til at teirra mannagongdir verða broyttar.

**Stuðlar í barnagørðum:**
Stuðlar, sum arbeiða á barnagørðum skulu bókast á § 3, høvuðskontuna fyri barnagarðar

**Forskúlar:**
Forskúlar skulu bókast á § 4 (her skal sjálvandi vera talan um undirvísing, ikki ansing)

**Ítróttarhallir, ið eru sambundnar við skúlar o.t.:**
Í fleiri førum er bygningar, sum hoyra til ymiskar høvuðskontur sambært kommunala kontustronginum, fysiskt bundin saman. Til dømis í Skúlanum á Giljanesi er ítróttarhøllin fysiskt bundin saman við skúlan, og bókar Vága kommuna tí allar útreiðslurnar, ið hoyra til

Kvíggjartún 1 • Postsmoga 2039 • 165 Argir
☏ (+298) 35 20 20 • 🖷 (+298) 35 20 25 • fmr@fmr.fo • www.fmr.fo

høllina, á skúlan. Í nógvum førum kunnu rokningar ikki býtast millum skúla og ítróttarhøll. Annað dømi er fótbóltsvøllur og ítróttarhøll, sum hoyra til Meginskúlan í Sandoynni. Avgjørt var, at í førum, tá talar er um ítróttarhallir, fótbóltsvallir og slíkar størri anlegg, skal rokningin bókast á høvuðskontuna fyri ítróttaranlegg, tá tað ber til, og um tað ikki ber til, so kann upphæddin bókast á meginhøvuðskontuna (t.d. Skúlin á Giljanesi), men skal flyting umvegis 7120/7620 gerast, so at nettotølini gerast rættari. Kommunan skal so gera ein býtislykil fyri hvussu útreiðslurnar skulu býtast.

**Viðlíkahald:**
Vanligt viðlíkahald skal sambært kommunala kontustronginum bókast á avvarandi stovn/rakstrarstað, t.d. so at vanlig skúlaumvæling av skúlum altíð fer á HK 23.22.xxx. Størri viðlíkahaldsarbeiði fara á løgujáttanina fyri avvarandi stovn.
Høvuðskonta 11.31.xxx  Umsiting og røkt av fastognum , er sostatt einans til bygningar v.m., ið ikki hoyra til ávísa aðra høvuðskontu, og kunnu umvæling av t.d. einstøkum skúlum, barnagarðum v.m. ikki bókast har.

**Tekniska deild /býarverkfrøðingur:**
Summar kommunur hava egnar býarverkfrøðingar (bókað á kommunufyrisitingina), aðar keypa verkfrøðingatænastur í samband við einstakar verkætlanir heldur (bókað á einstøku verkætlanina). Munur verður á útreiðslum til kommunufyrisiting og til verkætlanir.
Loysn var ikki funnin á seminarinum, arbeitt víðari við tí.

**Fíggjarlig frípláss:**
Fíggjarlig frípláss skulu bókast sum útreiðsla á § 2 á HK 21.72.xxx Forsorg, og verður mótbókað inntøka 2170 á barnaansingini.

**Avseting móti skatti**
Av tí at leiðslukunningin er vorðin broytt fyri at gera hana lættari at brúka, hevur verið neyðugt hjá Fíggjarmálaráðnum at gjørt nýggja vegleiðing um hvussu skattaavsetingin verður funnin í verandi leiðslukunning. Nýggja vegleiðingin (“Vegleiðing til skattaavseting fyri kommunur”) er at finna á portalinum hjá Gjaldstovuni, og á heimasíðuni hjá Fíggjarmálaráðnum.
Verandi háttur er kanska nakað torskildur, og skal Gjaldstovan kanna um til ber at gera nýggja skermmynd, ið ger tað lættari at eftirkanna skattaavsetingina í  Leiðslukunningini.